ítróttur

Nr. 83 • mikudagur • 4. mai 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# Fingu kongliga m

### Tað var ein stórfingin móttøka, sum kvinnuliðið hjá VB fekk, tá ið tað kom aftur úr Klaksvík í gjárkvøldið




*Spælararnir sótu til háborðs á móttøkuni í Vági*

Kvinnuliðið í hondbólti hjá VB fekk eina kongliga móttøku tá ið tær komu heimaftur til Vágs sunnukvøldið, eftir at hava tryggja sær FM heitið í dystinum ímóti stjørnuni fyrr um dagin.

Fleiri hundrað viðhaldsfólk hjá VB vóru við í Klaksvík og gjørdu sítt til at hetta var mestsum at rokna sum ein heimadystur hjá VB.

Komin til Vágs, var farið beint í høllina, har onnur hundraðatals mannfjøld bíðaði eftir teimum.

Í høllini vórðu tær fagnaðar sum tað sømir seg einum FM vinnara við røðum, gávum og heilsanum

Vágbingar høvdu eisini verið í sving, so har var bæði smurt breyð, kaka, saft, te og kaffi at fáa.

Og aftaná varð so dansur.

Á samkomuni takkaði Bogi Mortensen í hondbóltsdeildini hjá VB, viðhaldsfólkunum fyri tann stóra stuðul, sum tey vísa liðnum hvønn einasta dyst. Hann vísti á, at VB vann FM í fjør og tær funnu FM í ár.

Hinvegin var árið í fjør nógv darvað av rokinum um útlendsku spælararnar og Bogi Mortensen ivaðist ikki í, at tað oyðilegði teimum kappingarárið í fjør.

Hann vísti á, at hetta var kanska tað besta hondbóltsárið í Vági nakrantíð, tí tær yngru deildirnar og kvinnurnar í 3. Deild høvdu eisini vunnið fleiri heiðursmerki, men hetta var krúnar á verkinum.

Tí helt hann, at framtíðin fyri hondbóltinum í Vági sá bjørt út.

Men hann gloymdi heldur at takka teimum fíggjarligu stuðlum, sum VB hevði og hann takkaði.

Àsgerð Stenberg, sum er forkvinna í mentanarnevndini hjá Vágs Býráð segði, at tað var ikki av ongum, høllin í Vági hevur verið fullsett til hvønn dyst. Hon takkaði spælarunum fyri, at tey nógv vikuskifti um veturin løgdu á fjørðin at fara norðureftir at spæla hondbólt, hóast fleiri av teimum høvdu børn at hugsa um.

John Henrik Holm, sum hevur verið formaður í VB, vísti á, hvønn týdning hetta hevur fyri tað sosiala samanhaldið í bygdina.

– Fyri VB hevur tað sera stóran týdning at vinna eitt FM heitið. Serliga týdning hevur tað fyri eitt pláss í útjaðaranum at røkka so langt.

Eisini Rannvá Augustinussen, liðskipari hjá VB, takkaði viðhaldsfólkuum fyri stuðulin ígøjgnum alt kappingarárið.

At hondbólturin hevur eitt serligt pláss í hjørtunum á vágbingum, er litið at ivast í, tí høllin í Vági er at kalla fullsett til hvønn dyst og í sambandi við seinasta dystin í Klaksvík høvdu einir 300 vágbingar leita sær til Klaksvíkar at bera liðið fram til sigurs.

Fleiri av røðarunum fegnaðust serliga um, at tað eydnaðist at vinna FM í ár, nú VB fyllir 100 ár.



*– Her er ein av teimum meiri festligu viðhaldsmonnunum hjá VB*



*Fleiri hundrað fólk vóru í ítróttarhøllini í Vági leygarkvøldið og heiðraði VB- kvinnurnar tá ið tær komu suður við gullinum*